


*Trý álit um viðurskifti okkara við ES eru frammanundan gjørd: Eitt reytt, eitt blátt, eitt grønt, og nú kemur so tað gula*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Ynskja ikki tættari tilknýti til ES

**FØROYAR OG ES** Arbeiðsbólkurin, sum hevur kannað møguleikar og avbjóðingar í framtíðar samstarvi við ES, handaði í morgun Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharra, sítt álit

Leo Poulsen

Í eitt ár hevur ein arbeiðsbólkur kanna møguleikar og avbjóðingar í einum framtíðar samstarvi við ES. Í morgun handaði bólkurin so Jørgeni Niclasen sítt álit.

Setningurin hjá nevndini var at:

*kanna fortreytirnar fyri, hvussu Føroyar fáa gagnligasta tilknýti til ES, ið millum annað fevnir um tey fýra frælsini, vørur, tænastur, kapital og persónar, umframt granskinging, útbúgving mentan og so framvegis.*

Kanningarnevndin skal í hesum sambani kanna fyrimunir og vansar fyri, at Føroyar standa uttan fyri ES, eins og kanningarnevndin skal kanna fyrimunir og vansar við at Føroyar fara upp í ES. Harumframt skal kanningarnevndin lýsa munin millum at danski ES limaskapurin verður víðkaður til at fevna um Føroyar og ein sjálvstøðugan føroyskan ES limaskap, og greina fortreytirnar fyri báðum.

Nevndin hevur serliga hugt at fýra møguleikum, sum hava verið frammi í politiska kjakinum:

1. At víðka verandi samstarv
2. At Føroyar verða partur av danska ES limaskapinum
3. Sjálvstøðugur føroyskur ES limaskapur
4. EBS limaskapur

## Ikki hug á ES

Talan er um ein arbeiðsbólk við 10 limum. Dentur hevur verið lagdur á, at nevndin røkkur so breitt landafrøðiliga og fakliga sum gjørligt. Somuleiðis hevur dentur verið lagdur á, at nevndin hevur havt limir, ið kenna ES gjølla innann ífrá.

Arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløg í Føroyum hava eisini verið væl umboðað, og í heila tikið hevur verið miðað eftir, at nevndin hevur dekkað so breitt sum gjørligt.

Summar av niðurstøðunum koma helst óvart á fleiri fólk.

Eitt nú staðfesti umboðið fyri Vinnuhúsið, at arbeiðsgevarar ikki hava nakað ynski sum so um eitt tættari tilknýti til ES. Í høvuðsniðurstøðuni verður sagt:

»Saman við Vinnuhúsinum og Samtaki eru Reiðarafelagið og Bóndafelagið av teirri áskoðan, at teirra áhugamál í høvuðsheitinum verða nøktað í verandi samstarvi við ES«.

Tað er serliga fiskivinnuspurningurin sum ger, at ivi er hjá fleiri, og breið semja tykist vera um, at ein avgjørd fortreyt fyuri føroyskum limaskapi í ES er, at Føroyar framhaldandi ráða yvir egnari fiskiveiðiskipan.

Høvuðsniðurstøðan endar við einum samandrátti, sum sigur soleiðis:

»Sum niðurstøðan vísir á, eru ongar lættar loysnir, tá talan er um at víðka samstarvið við ES. Avgerandi spurningar sum løgfrøðiligt atlit, politiskar raðfestingar, fíggjarligar og fyrisitingarligar avbjóðingar og spurningar sum ríkisrættarliga støða Føroya og felags fiskivinnupolitikkurin hjá ES, mugu viðgerast og semjur finnast. Í verandi støðu tykjast summir av teimum fýra møguleikunum meira sannlíkir enn aðrir«.

Sum sæst ikki serliga ítøkiligt.

Nú skulu so allir partar nærlesa álitið, áðrenn nakað meiri hendir í málinum.

> **Okkara áhugamál verða í høvuðsheitinum nøktað í verandi samstarvi við ES.**


EYSTUROYAR BETONG

- grundir
- dekk
- múrar
- trappur
- garðar
- tún

o.a. betongarbeiði væl úr hondum greitt fyri kappingarførar prísir. Tilboð verða givin

TELEFON 56 20 70 / 56 20 71

7 Byggivirki

Orkusparandi heildarloysnir

Sethús • Tvíhús • Íbúðir

Skjótt, gott og bíligt – sjálvandi

Lyklaklárar loysnir

Tlf. 56 20 70 · Fax 44 78 90

T-postur: janj@post.olivant.fo




**Eini sethús á Selvindsvegi 2 á Strondum verða hervið lýst til sølu.**

Húsini standa væl fyri í friðarligum umhvørvi. Frálíkt útsýni er yvir allan fjørðin og út á Eystnes.

Vídd á grundøkinum er uml. 440 fermetrar.

Húsini eru bygd í 1922 og eru í trimum hæddum, miðhædd, kjallari og loft. Hvør hæddin er uml. 54 fermetrar (uml. 9 x 6 mtr.), loftið tó nakað minni.

**Innrætting:**
**Miðhædd:** Køkur, kamar, 2 stovur, durur, gongd og baðirúm við brúsu.
**Loft:** Hjúnakamar, 2 smærri kømur, gongd/trappa.

**Kjallari:** Óinnrættaður. Góður møguleiki er fyri innrætting. Trappa er frá miðhædd til kjallara.

Húsini eru kløDD av nýggjum, og vindeyguni eru skift í 2002 – 2004.

Til ognina hoyra tveir hjallar/hoyggjhús á uml. 15-16 fermetrar.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Heygum & Petesen, adv. á tel. 35 17 10 ella hp@adv.fo.

Heygum & Petersen
advokatskrivstova

Advokatskrivstovan hjá Bjørn á Heygum & Alfred Petersen

Bøgøta 16 | postboks 164 | FO-110 tórshavn | Tlf. 351710 | fax 351711 | hp@adv.fo | www.adv.fo